Skeiðslýsing

Skeiðsnummar	8996.16
Heiti	Klinisk vegleiðaraútbúgving
ECTS	10
Fortreytir	Miðallong heilsufaklig útbúgving.
Stig	Bachelor
Endamál	Ætlanin við skeiðinum er, at lesandi mennir sín førleika at fyriskipa, vegleiða, undirvísa og prógvdøma/meta í klinisku undirvísingini í heilsuútbúgvingunum.
Innihald	Innihaldið í undirvísingini er: • Læruástøði og lærutilgongdir • Læruumhvørvi við denti á lærurúm • Læruhættir, vegleiðing og vegleiðaraleiklutur • Refleksjón • Eftirmeting og døming
Læru- og undirvísingarhættir	Undirvísingin er skipað við skifti millum fyrilestrar, dialog, borðbólkar, bólkaarbeiði, venjingar og sjálvlestur.
Læruúrtøka	Eftir lokið skeið, skal lesandi vera før/ur fyri at: • Greiða frá meginhugtøkunum innan námsfrøði við atliti at kliniskari vegleiðing og undirvísing • Leita fram, velja og meta granskingargrundaða vitanum námsfrøði og didaktik, sum viðvíkur kliniska útbúgving í heilsufakum • Greiða frá vísindaástøðiliga grundarlagi í mun til útvald námsfrøðilig ástøði og háttaløg • Menna, leggja til rættis, fremja og eftirmeta kliniska vegleiðing og undirvísing við støði í luttakarafortreytum og týdninginum, sum læruumhvørvið hevur fyri lærutilgongdir • Reflektera um og menna egnu vegleiðing • Eftirmeta og døma í mun til útbúgvingarstig, læruúrtøku, galdandi lóg, kunngerðir og reglur.
Prógvtøkuháttur	Prógvtøkan er í 2 pørtum:

	1. Kravd uppmøting til undirvísingina (80 %) 2. Skrivlig uppgáva við endan av skeiðinum.
Próvdøming	Innanhýsis
Próvtalastigi	Staðið/ikki staðið
Lestrarlisti	Sí undirvísingarskrá
Ábyrgd	Súsanna Herdalur Tausen; susannat@setur.fo